# Jólakalendarin 2006

## Trøll og vættrar í mánalýsi





Longu tíðliga seinnapartin fór at skýma og skjótt var myrkt. Trøllapætur og omman vóru farin í mánalýsinum niðan í Flykrudalin og stóðu nú á sjálvum Vætrasteininum, sum var ynskisteinurin á Stórafjalli.

Omman visti nógv um himmalin, mánan og stjørnurnar. Trøllapætur hevði einaferð spurt ommuna, hvør var eldri, hon ella mánin. Tá flenti omman og segði við Trøllapætur, at sjálvt tey allarelstu trøllini í Norra, vóru ikki til tá mánin byrjaði at skína og mala um jørðina.

Og tað skilti Trøllapætur eisini væl. Tað hevði mangan verið strævið at verið trøll og gingið um fjøll, um mánin ikki lýsti einum vegin á náttartíð. Og hóast hetta var myrkasta tíð av árinum, so bilti ikki tá mánin hekk stórur og bjartur uppiyvir teimum.

– Omma, búgva vætrar undir hesum steininum?

Trøllaomman hevði ivaleyst væntað, at Trøllapætur fór at spyrja og hon visti meira enn trøll flest um vætrar og vætralív á jólum.

– Ja, góði Trøllapætur. Undir hesum steininum hava vætrar búð alla mína tíð. Teir gomlu vætrarnir eru bæði klókir og snildir. Teir passa seg sjálvar og koma sjáldan oman í bygdina. Men á jólum, tá ið fólk stákast og kóka jólagreyt, brellast vætrarnir eftir onkrum góðum og tá nærkast teir oftani húsunum. Øðrvísi er við smáu vætrabørninum, sum nógv eru farin at kalla nissur. Tær spæla krógva og blunda alt árið, goyma seg í hjallum, klatra uppá svalir, sveiggja í gardinum og ljósakrúnum og liggja og fjala seg uppi á húsaloftinum. Og so smetta tær fyri jólamanninum um børnini ikki skikka sær væl.

– Smetta fyri jólamanninum?

Trøllapætur hugdi tortrúgvin uppá ommuna.

– Ja, men hvat jólamaðurin vil leggja oyra til, er ringt at siga. Børn eru hvørki verri ella betri enn trøll. Tey finna uppá so mangt. Og oftani duga tey ikki at skyna á hvat er loyvt og hvat er skeivt.

Trøllapætur hugsaði um allar vætrarnar, sum krógvaðu seg og hildu til undir steininum. Honum untist ikki ov væl og vildi heimaftur í trøllasmáttuna. Men fyrst mátti hann hyggja uppá mánan og av fullum huga ynskja sær okkurt serligt til jóla. Nakað, sum ongin mátti vita, heldur ikki Trøllaomman, tí so fekk hann tað ikki í jólagávu. Jú, so mikið visti Trøllapætur um ta megi, sum ynskisteinurin fekk í mánalýsinum.

Mánin skein og lýstu teimum vegin oman í trøllabýlið. Uppi yvir gamla skríninum hekk vakri og trøllsligi jólakalendarin og bíðaði eftir honum.

Ein mjólkasopi var heilt víst góður omaná. Í skundi fann Trøllapætur talið 18 og gjørdist bæði bilsin og glaður, tá ið hann sá sín trúfasta vin, mánan, goyma seg aftan fyri lúkuna.







Vit ynskja tær eini góð og hugnalig jól

Tel 345600, www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

- so ert tú tryggari